# Kiosk Activ seld

**Eftir at hava staðið handan diskin í Kiosk Activ í meiri enn 34 ár, hevur Martha Hansen nú gjørt av at selja Kiosk Activ. Tá hon byrjaði, var bert talan um eina pinkulítla kiosk. – Eg hevði ikki droymt um, at hetta fór at verða mítt lívsverk, sigur Martha**

NÝGGJUR EIGARI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Eyðun Simonsen og Martha Hansen hava nú skift um pláss í Kiosk Activ. Eftir 34 ár innanfyri diskin, er Martha nú vorðin vanligur kundi, og fer sostatt framyvir bert at vera uttanfyri diskin. Nýggi eigarin, Eyðun, hevur yvirtikið plássið innanfyri*

*Mynd Jens Kristian Vang*

Seinasta mánaða vóru tað 34 ár liðin síðani, at Martha Hansen lat eina lítla kiosk upp á Jónas Broncksgøtu.

– Tá eg byrjaði, hevði eg bara eina lítla biks. Tað var tá ikki í mínum tonkum, at hetta fór at vera mítt lívsverk. Men tað gekk væl, og so við og við bleiv kioskin størri, sum vit tóku fleiri rúm uppí, greiðir Martha frá. – Nú fyllir kioskin allan kjallaran sum hann er. Í byrjanini tók hon bara eitt lítið horn, sigur hon.

Hon sigur, at tað er eitt stórt arbeiði at hava eina slíka kiosk. Í 34 ár hevur hon altíð verið standby, ið so fall, at okkurt skuldi stungið seg upp í Activ.

– Tey seinastu 34 árini havi eg sjálv latið kioskina upp um morgunin og stongt hana aftur um kvøldið, at kalla hvønn dag. Men tey seinastu árini havi eg fingið góða hjálp frá dóttrini, sum eisini hevur rikið kioskina seinastu tíðina, og frá góðum arbeiðsfólki, sigur Martha og staðfestir, at tað er eitt sera bindandi arbeiði at dríva eina kiosk.

Tað má passast væl, sigur hon.

## Hugna sær

Hóast hon hevur arbeitt har hvønn dag í 34 ár, er Martha ikki bangin fyri at gevast.

– Øll spyrja meg hvat eg so skal gera. Men eg skal nokk finna upp á okkurt, tað er jú so nógv ymiskt man kann. Fyrst og fremst fari eg at slappa av og hugna mær. Einaferð er man noyddur at gevast, og nú hvørki tími ella orki eg at arbeiða meir. Man veit ikki hvussu langt man hevur eftir, og eg ætli mær at taka tað róligt, meðan eg enn kann, staðfestir Martha við einum smíli.

Hon sigur, at hon ongantíð áður hevur hugsað um at selja Kiosk Activ, hóast tað hevur verið tungt av og á.

Upprunaliga var ætlanin heldur ikki at selja kioskina nú. Martha ætlaði bert at taka seg aftur.

– Men eg veit ikki, nú bleiv tað bara soleiðis, og eg rokni heilt bestemt við, at nýggi eigarin fer at fara væl við henni, sigur hon, og leggur síðani afturat – men tá eg fari at koma inn her í framtíðini, rokni eg næstan við, at eg fari at biðja arbeiðsfólkið gera ymiskt, sum eg síggi, treingir til at gerast. Tað fer at vera ringt at koma inn sum vanligur kundi, uttan at hugsa um hvat skal gerast, sigur hon. Alt í alt sigur Martha tó, at hon gleðir seg til at gevast við at arbeiða.

Sjálvandi er tað eisini eitt sindur trist, serliga hesa tíðina, nú beint uppundir jólini. Men tað vísir seg, at fleiri av teimum gomlu handilseigarunum gevast nú. Seinastu tíðina eru nógvir handlar antin stongdir ella seldir. Og tað er eisini tíð uppá hjá mær at gevast nú, staðfestir Martha.

Hon sigur, at handilsverðin er harðnað, síðani hon byrjaði við síni lítlu kiosk. Prísirnir verða allatíðina skrúvaðir niðureftir, og tað ger sjálvsagt, at tað verður minni og minni eftir.

– Eg havi klárað meg, tí eg havi havt ein sera trúgvan kundaskara, sum eg virkuliga má takka fyri øll hesi árini. Og eg má biðja kundarnar um at taka væl ímóti nýggja eigaranum, sigur Martha at enda.

# Spennandi avbjóðing

**Nýggi eigarin í Activ eitur Eyðun Simonsen og er bert 25 ára gamal. Hóast kioskin ongantíð varð lýst til sølu, frætti hann, at Martha Hansen, fyrrverandi eigari, ætlaði at gevast, og tí lá hann framvið, fyri at vita, um hon eisini ætlaði at selja. Hetta var um mánaðarskiftið juli/august, og í dag hevur Eyðun yvirtikið kioskina**

NÝGGJUR EIGARI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*




*Martha Hansen hevur bygt Kiosk Activ upp frá grundini, men orkar nú ikki meir. 25 ára gamli Eyðun Simonsen er nýggi eigarin av kioskini, sum eftirhondini má metast sum ein sonn býarmynd í Havnini*

*Mynd Jens Kristian Vang*

– Ígjøgum keldur í heilsøluni frætti eg, at Martha ætlaði at gevast við Kiosk Activ. Eg helt, at tað ljóðaði sum ein spennandi avbjóðing, og eg hevði eisini hug at royna okkurt nýtt, so tí ringdi eg til hennara.

Hetta var um mánaðarskiftið juli/august í ár, greiðir Eyðun Simonsen frá.

Síðani tað hevur samskiftið verið tætt teirra millum, og í vikuni yvirtók Eyðun kioskina og allar ognirnar, sum hoyra til. Hetta uttan, at Kiosk Activ nakrantíð hevur verið lýst til sølu.

## Nakrar broytingar

Eyðun hevur drúgvar royndir í handilsverðini. Men tað er langt síðani, at hann seinast hevur arbeitt í matvøruhandli.

– Tá eg var yngri arbeiddi eg bæði í Bónus og Miklagarði, men tað fara at vera eini 6-7 ár síðani nú. Síðani havi eg arbeitt í ørðum handlum, so eg havi nógvar royndir at dúva uppá, greiðir Eyðun frá.

Hann sigur, at tað er ótrúliga nógv arbeiði í eini slíkari kiosk, og at hann væntar, at hann kemur at vera har nógv sjálvur.

– Eg fari nokk ikki at standa nógv aftanfyri diskin, men eg ætli mær at hava dagligu leiðsluna av handlinum, og eg komi tí væntandi serliga at vera her um morgnarar, greiðir Eyðun frá

Hann sigur, at hann eftir jól allarhelst fer at gera nakrar broytingar í Kiosk Activ. Enn vil hann tó ikki siga júst hvat hann hugsar um.

– Øll starvsfólkini vera tó verandi. Bert eigarafólkini hava boðað frá, at tey fara at taka seg aftur, men vónandi verða tey allíkavæl inntil jólini koma. Her eru so nógv ting at seta seg inn í, so tað hevði verið gott um tey kundu hjálpt mær at byrja, sigur Eyðun.

Spurdur, um nýggja upplatingarlógin fer at gera sína ávirkan galdandi í Kiosk Activ, svarar Eyðun, at tað væntar hann ikki.

– Vit hava altíð opið allíkavæl. Frá kl 07.30-23.00 hvønn dag, eisini sunnudag. Bara 1. dagarnar hava vit stongt. Eg dugi heldur ikki at síggja, at vit fara at hava nakran fyrimun av at hava opið um næturnar. Tá er einki fólk úti allíkavæl, so eg vænti ikki, at tað koma broytingar í upplatingartíðirnar fyribils, staðfestir Eyðun at enda.